# Herman yvirtekur snikkararnar í Grønlandi



Herman Eysturoy, snikkarameistari, fær nú nýggja útgerð, sum hann hevur keypt frá gamla snikkaravirkinum í Grønlandi. Somuleiðis fara teir báðir snikkararnir, ið hava starvast á gamla snikkaravirkinum framyvir at starvast á snikkaraverkstaðnum hjá Hermani í Marknagili

Mynd: Jens Kr. Vang

**Herfyri bleiv gamla snikkaravirkið í Grønlandi selt Havgrími Johannesen, sum segði seg hava ætlanir um at gera íbúðir í gamla snikkaravirkinum. Nú hevur nýggi eigarin selt Hermani Eysturoy, snikkara, útgerðina í gamla virkinum, og eisini fylgja tveir snikkarar við**

SNIKKARAVIRKSEMI

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nýggi eigarin av snikkaravirkinum í Grønlandi hevur bert brúk fyri sjálvum hølunum, og tí hevur hann selt Hermani Eysturoy alla snikkaraútgerðina, sum er í virkinum. Teir báðir snikkararnir, ið hava starvast á snikkaravirkinum, fylgja somuleiðis við útgerðini niðan í verkstaðið hjá Hermani, sum liggur í Marknagili.

### Hava nógv at gera

Herman Eysturoy sigur, at nú var møguleikin at ogna sær góða útgerð og samstundis fáa tveir dugnaligar snikkarar afturat, og tí var bara at smekka til, sum hann málber seg.

– Vit eru bert tveir snikkarar her á verkstaðnum frammanundan, og nú fáa vit so tveir afturat. Hetta gevur okkum nógvar møguleikar. Í dag gera vit bert líkkistur, trappur og okkurt smávegis annað, men tá ið vit fáa tveir mans afturat tann 1. apríl, verður støðan ein onnur. Tá fara vit eisini at gera dygdargóð vindeygu og hurðar, sum teir í Grønlandi hava verið kendir fyri at smíða, greiðir Herman Eysturoy frá.

Hann sigur eisini, at snikkarar hava nógv at gera í Føroyum í dag, og tænastan hjá honum við gravarhjálp vindur somuleiðis upp á seg.

– Tað hevur verið eitt sindur slakt við snikkaraarbeiði í januar, men nú er ferð komin á aftur. Gravarhjálp bara veksur, og tað eru fleiri og fleiri, ið vilja hava professionella hjálp í sambandi við jarðarferðir, sigur Herman Eysturoy.

---

## Fólk vóru klár til hálkuna

Mánakvøldið legðist nakað av kava kring landið, og vegirnir gjørdust hálir. Vakthavandi á politistøðini í Havn segði í morgun, at tað tykist sum um, at bilførararnir hesaferð vóru fyrireikaðir til hálkuna.

– Vanliga, tá ið tað hevur verið tátt leingi, og hálka kemur, eru fleiri smá ferðsluóhapp, men soleiðis hevur ikki verið hesaferð. Tað hevur verið sum í grøvini bæði í morgun og í gjárkvøldið, segði vakthavandi í morgun.

**tn**

# Árni fer frá sum stjóri



*Eftir at hava sitið við róðrið á Skipafelagnum Føroyar í drúgt áramál, takkar Árni Joensen fyri seg, og nýggjur stjóri skal finnast*

savnsmynd

**Skipafelagið Føroyar skal hava nýggjan stjóra, nú Árni Joensen eftir drúgva tænastu takkar fyri seg**

STJÓRASKIFTI

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Árni Joensen hevur starvast á Skipafelagnum í ein mansaldur, men, sum skilst er tíðin nú komin, at nýtt fólk skal finnast at taka við leiðsluni á gomlu fyritøkuni,

### Er burturstaddur

Vit royndu í allan morgun at fáa fatur á Árna Joensen, men tað bar ikki til. Stjórin á Skipafelagnum er við í stóra ferðalagnum av føroyskum vinnulívsfólkum, sum í løtuni er á vitjan í India saman við løgmanni og øðrum umboðum fyri politiska myndugleikan her á landi.

Á Skipafelagnum bar heldur ikki til at fáa tíðindini váttað, men tey vóru heldur ikki avsanaði.